## Gávur til starvsfólk, hjá tí almenna

Fíggjarmálaráðið boðar í dag frá, at starvsfólk hjá landinum, sum hava 25, 30, 40 og 50 ára starvsdag, kunnu fáa eina peningagávu, ella gávu áljóðandi sama virði, frá almenna stovninum. 25 ár í starvi gevur 2.000 kr., 30 ár geva 3.000 kr. 40 ár 4.000 og 50 ár í almennum starvi geva 5.000 kr. Tá ið áramálið verður talt, telur øll tænasta hjá landsins stovnum við. Tó ikki tænasta hjá almennum partafelag. Eisini kunnu starvsfólk, sum hava rundan starvsdag fáa ein frídag við løn.



## Norðurlendsk jólakonsert

Leygardagin 13. desember kl. 17 verður ein norðurlendsk jólakonsert í Helligaands Kirken á Strøjnum í Keypmannahavn. Tey luttakandi eru: Det Islandske Kvindekor, grønlendska MIK-kórið, føroyska Mpiri, grønlendska AAVAAT-kórið, íslendska STAKA og føroyska Húsakórið. Atgongumerkini kosta 100 krónur fyri vaksin og børn sleppa ókeypis inn.

# Tvørafólk seks milliónir eftir hæli

**Næsta ár verða tvørafólk noydd at spenna beltið serstakliga fast um miðjuna, tí inntøkurnar hjá kommununi rapa niðureftir. Men batna útlitini, er ætlanin at loysa beltið aftur**

FÍGGJARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á Tvøroyri er ikki pláss fyri nøkrum sum helst útbyggingum næsta ár, men sparingarnar føra ikki uppsagnir við sær*

Tvørafólk mugu brynja seg til verri tíðir.

Tað er greitt eftir at Tvøroyrar Býráð samtykti fíggjarætlanina fyri næsta ár.

Og ásannast má, at fíggjarlógin mest av øllum líkist einum blóðreyðum ávaringarskelti um at tað nú av álvara er farið at trongjast saman um hjá kommununi.

- Nýggjastu metingarnar vísa, at tilsamans verða inntøkurnar hjá kommununi seks milliónir minni næsta ár, enn tær verða í ár.

Í ár verða inntøkurnar hjá Tvøroyrar Kommunu og Tvøroyrar Havn tilsamans 53 milliónir, men næsta ár, verða tær ikki meiri enn 47 milliónir, vísa nýggjastu tølini.

### Tað er ein afturgongd upp á 11,3%.

Av hesum verða inntøkurnar hjá kommununi fimm milliónir minni næsta ár enn tær eru í ár, men hjá Tvøroyrar Havn, sum hevur havt eina inntøku upp á eina millión, eru inntøkurnar at kalla burtur.

Alt hetta merkir, at býráðið hevur leitað við lummalykt og sjóneyku eftir møguleikum at spara og í hesum sambandi hava allir stovnar undir kommununi fingið boð um at spara 5% á teirra fíggjarætlan.

Samstundis er at kalla onki oyra sett av til nýíløgur.

- Inntøkurnar, vit fáa næsta ár, røkka so dánt til at sjálvan raksturin, varð ført fram á býráðsfundinum í gjárkvøldið.

- Undir vanligum umstøðum høvdu inntøkurnar næsta ár hækkað nøkur prosent, so at kommunan hevði havt einar 8-10 milliónir til íløgur og tað hevði givið eina heilt aðra gongd í kommununi, men sum støðan er nú, er ikki hugsingur um at gera nakrar íløgur.

### Ongar uppsagnir

Hinvegin gjørdi býráðið púra greitt, at tey hava lagt sera stóran dent á at varðveita tað virksemi sum er, fyri at sleppa undan at siga fólki upp.

- Tað hevur stóran týdning at sleppa undan at siga starvsfólki hjá kommununi upp, tí missa fólk starvið, er stórur vandi fyri, at tey flyta av oynni og ikki koma aftur, tí nú á døgum er altso ikki bara at ragga sær yvir um vegin eftir einum øðrum starvi.

- Tí er ikki ráðiligt at seta størri sparingar í verk við teirri avleiðing, at fólk skulu sigast úr starvi, siga tey í býtáðnum.

Tað er somuleiðis greitt, at skattaprosent og barnafrádráttur verður ikki broytt og sostatt er kommunuskatturin næsta ár framvgis 23,5% og tað varð mett at vera ríkiliga høgt.

Barnafrádrátturin næsta ár verður 5000 krónur og tað sama upphædd sum í ár.

Býráðslimirniur gjørdu tó eisini greitt, at vísir tað seg tíðliga í næsta ári, at inntøkurnar verða hægri enn mett, eru teir sinnaðir at endurskoða fíggjarætlanina, so at tað kanska verður rúmd fyri at gera onkrar íløgur eisini.

# Otto West á odda

KOMMUNU-POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvalbiar Bygdaráð hevur nú eisini skipað seg eftir kommunuvalið í heyst. Tað hendi í gjárkvøldið og tá varð eisini greitt, at Otto West, sum er borgarstjóri í løtuni, heldur fram í hesum starvi.

Tá ið nývalda bygdaráðið í Hvalba, sum eisini umfatar Sandvík, hevði fund klokkan 22 í gjárkvøldið, var bara eitt uppskot til borgarstjóra. Tað var Otto West og hann varð sostatt valdur uttan atkvøðugreiðslu.

Líka stór var semjan, tá ið varaborgarstjóri skuldi veljast, tí til tað starvið var eisini bara eitt uppskot. Tað var Niels Olaf Eyvindsson, sum er nývaldur bygdaráðslimur og hann varð sostatt valdur til varaborgarstjóra, eisini uttan atkvøðugreiðslu.

Eftir síðsta bygdaráðsval varð Levi Niclasen valdur til borgarstjóra, men hann legði frá sær fyrr í ár og tá varð Otto West valdur til eftirmann hansara og nú fær hann so fýra ár afturat í sessinum.

Á myndini síggja vit nývalda bygdaráðið í Hvalba: Frá vinstru sita Martin í Nesi, Rúni Thomsen, Herdis Jensen, Trygvi Midjord, Otto West, Niels Olaf Eyvindsson og Niels Jacob Thomsen.

Rúni Thomsen og Niels Olaf Eyvindsson eru nývaldir. Herdis Jensen er einasti bygdaráðslimur úr Sandvík og hon er eisini nývald, tó at hon í tvey skifti í hesum valskeiðnum hevur sitið sum varalimur í bygdaráðnum.

Í morgin, leygardagin, verður nýggja kommunuskrivstovan í Hvalba alment tikin í nýtslu og í tí sambandi verður almenn móttøka í húsinum seinnapartin í morgin



*Nývalda bygdaráðið í Hvalba skipaði seg í gjárkvøldið og tað er greitt, at borgarstjórin heldur fram*